# Havnarmenn vilja byggja flótandi hotell í Ålborg




HOTELLVIRKSEMI

Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Teir tríggir havnarmenninir, feðgarnir Johan og Martin Restorff og Petur Jacobsen bjóða sær nú til at byggja eitt risastórt flótandi hotell í havnini í danska býnum Ålborg. Tað er bert stutt síðani, at hesir somu menn løgdu fram eina spildurnýggja ætlan um at byggja eitt flótandi hotell á Vestaru vág í Havn. Ætlanin teir nú hava lagt fyri myndugleikarnar í Ålborg er fýra ferðir so stór sum tann í Havn. Martin Restorff og Petur Jacobsen, sum eru oddamenn aftanfyri ætlanina, siga, at teir hava lagt umsókn inn hjá Ålborg Kommunu, men enn er ov tíðliga at siga, hvørja móttøku hon fer at fáa. Talan er um 90 til 100 verilsi og annars um eina ætlan, ið fevnir um bæði matstovur og onnur tilboð.


## Adventistaskúlin

**Innskriving til 1. flokk verður í Adventistaskúlanum 15. januar 2007 frá kl. 16:00 - 17:30**

Nøkur fá pláss eru eftir. Havið navna/dópsseðil við.

Adventistaskúlin er ein frískúli, sum verður rikin út frá einum kristnum sjónarmiði.

Adventistaskúlin hevur 40 ár á baki.

Adventistaskúlin hevur í løtuni 115 næmingar frá 1.-7. flokk.

Næmingar í 1., 2. og 3. flokki byrja skúlagongdina í nýggjum bygningi í august.

Fleiri upplýsingar á heimasíðu okkara www.skulin.fo/adv

Hoyvíksvegur 56 · FO-100 Tórshavn · Tel. 31 32 60 · sdaskuli@post.olivant.fo



## Bilmekanikari

Til bilaverkstað okkara, ið er ein av landsins størstu, sóknast vit eftir einum bilmekanikara at byrja skjótast tilber.

Vit bjóða eitt fjøltáttað og jaligt arbeiðsumhvørvi og fakliga menning við góðum møguleikum fyri eftirútbúgving og skeiðum. Bilaverkstaðið veitir tænastuumvælingar til Nissan, Opel, Peugeot og Saab bilar.

Tað er ein avgjørdur fyrimunur um viðkomandi kann arbeiða sjálvsstøðugt og samstundis hevur kunnleika til brúk av teldum. Vit ímynda okkum ein nærlagdan persón, ið hevur koyrikort og sum stundum kann arbeiða langar dagar, tá ið á stendur.

Løn sambært avtalu.

Eru spurningar til starvið sum bilmekanikari, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Tórur Bærentsen, Verkførara, á tlf. 345400. Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum, skulu innan 26. januar sendast til:

Auto Service
Att.: Árni Rasmussen
Við Oyggjarvegin
FO-100 Tórshavn



PEUGEOT OPEL SAAB NISSAN

Auto Service
www.autoservice.fo

TEAM85